# NUMO

# góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

## Frágreiðing um gjøgnumskygni sambært løgtingslóg nr. 50 frá 4. mai 2021

## Roknskaparárið 2023

Frágreiðingin um gjøgnumskygni er almannakunngjørd á heimasíðu felagsins, www.NUMO.fo, 16. apríl 2024

# Innihaldsyvirlit

FRÁGREIÐING UM GJØGNUMSKYGNI .... 2
LØGFRØÐILIGA SKIPANIN OG OGNARVIÐURSKIFTI .... 2
LEIÐSLUSKIPANIN .... 2
NETVERK .... 3
SAMSÝNING TIL PARTNARAR .... 3
INNANHÝSIS GÓÐSKUSKIPANIR, POLITIKKUR FYRI ÓHEFTNI OG EFTIRÚTBÚGVING .... 3
POLITIKKUR FYRI ÓHEFTNI .... 4
INNANHÝSIS VITAN, BØRSETISKIR REGLAR OG REGLUR UM NEVNDARPOSTAR FYRI STARVSFÓLK .... 4
POLITIKKUR FYRI EFTIRÚTBÚGVING .... 5
SEINASTA GÓÐSKUEFTIRLIT .... 6
VÁTTAN FRÁ LEIÐSLUNI UM GÓÐSKUSTÝRINGSSKIPANINA OG POLITIKK UM ÓHEFNI .... 6
VÁTTAN FRÁ LEIÐSLUNI UM EFTIRÚTBÚGVING .... 6
BÝTI AV HEILDARUMSETNINGINUM Á SAMSÝNING FYRI GRANNSKOÐAN AV ÁRSFRÁSØGNUM UMFRAMT IKKI-GRANNSKOÐANARUPPGÁVUM .... 7
YVIRLIT YVIR VIRKIR, FEVND AV LØGTINGSLÓG NR. 50 FRÁ 4. MAI 2021 (ARTIKUL 13 Í FYLGISKJALI), SUM GRANNSKOÐANARVIRKIÐ Í ROKNSKAPARÁRINUM FRAMMANUNDAN HEVUR GJØRT UPPGÁVUR FYRI: .... 7

# Frágreiðing um gjøgnumskygni

Løgtingslóg nr. 50 frá 4. mai 2021 (PIE-fyriskipanin) krevur, at øll góðkend grannskoðanar-virkir, sum grannskoða fyritøkur við serligum almennum áhuga, kallað PIE-fyritøkur, skulu hava eina frágreiðing um gjøgnumskygni. Hendan frágreiðing skal vera almannakunngjørd á heimasíðu felagsins.

**Løgfrøðiliga skipanin og ognarviðurskifti**

Navn felagsins:
NUMO , góðkent grannskoðanarvirki Sp/f
Smyrilsvegur 20
FO-100 Tórshavn

Felagið er skipað sum eitt smápartafelag, sum er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd.

Grannskoðarar, ið eru løggildir eftir grannskoðaralógini, eiga sjálvir ella umvegis teirra feløg 22,2 % av partapeninginum í NUMO Sp/f (atkvøðurættur 25,0 %). Grannskoðarar, ið eru skrá-settir eftir grannskoðaralógini, eiga sjálvir ella umvegis teirra feløg 66,6 % av partapeninginum í NUMO Sp/f (atkvøðurættur 75 %).

Partaeigararnir, ið eiga í NUMO Sp/f umvegis teirra feløg, eru í starvi hjá NUMO Sp/f.

**Leiðsluskipanin**

Felagið er skipað við eini nevnd og eini stjórn. Leiðslan í felagnum er soleiðis skipað:

*Nevnd:*
Victor Nielsen, formaður
Heini Mortensen
Bjarni Arnason
Súni Schwartz Jacobsen

*Stjórn:*
Súni Schwartz Jacobsen
Bjarni Arnason

Skipað verður fyri partaeigarafundum, tá tørvur er á tí, og annars er sambært lógini ein vanligur aðalfundur hvørt ár.

Á ársaðalfundi felagsins atkvøða partaeigararnir og gera soleiðis sína ávirkan á felagið galdandi. Hendan ávirkanin er at velja nevnd og grannskoðara, samtykkja viðtøkur, og at góðkenna ársfrásøgnina. Innanhýsis viðurskiftini millum partaeigararnar eru ásett í einum partaeigarasáttmála.

## Netverk

NUMO Sp/f er ikki formliga knýtt at nøkrum altjóða netverki. Felagið hevur óformligar samstarvsavtalur við grannskoðanarfyritøkur í Danmark og Íslandi, men talan er tó ikki um netverk.

## Samsýning til partnarar

Partaeigararnir, ið eiga í NUMO Sp/f umvegis teirra feløg, eru allir í starvi hjá NUMO Sp/f. Samsýning teirra er føst løn umframt yvirtíð, tá ið hetta er aktuelt. Tá ið árið er liðugt, verður mett um, hvørt tað er ráðiligt at veita vinningsbýti til eigararnar.

Bonus verður ikki ásett.

## Innanhýsis góðskuskipanir, politikkur fyri óheftni og eftirútbúgving

*Innanhýsis góðskuskipanir*
Tær yvirskipaðu rætningslinjurnar og vegleiðingarnar fyri góðsku á øllum økjum er lýst í "Góðskustýringshondbók".

Tað varandi kravið til góðsku og innanhýsis góðskuskipanir skal tryggja at:

- NUMO SP/F livir upp til krøvini í lóggávuni, grannskoðanar- og roknskaparvegleiðingum, góðum grannskoðanarsiði og teimum etisku reglunum
- Kundarnir uppliva høga góðsku og virðisskapan, sum lýkur teirra krøv, og tað teir vænta
- Veitingar frá NUMO SP/F skulu veitast við javnt góðari góðsku
- Vandin fyri feilum og harav fylgjandi tapi og endurgjaldi verður møttur og minkaður mest møguligt við altíð at vísa nærlagni rættstundis og professionella atferð
- Møguligir kundar skulu altíð – sum eitt týdningarmikið kappingarparametur – uppliva, at NUMO SP/F er ein kompetent og professionel fyritøka, tá ið kundar umhugsa at skifta grannskoðara ella ráðgevara
- Góðskustýringsskipanir hjá NUMO Sp/f skulu til eina og hvørja tíð kunnu góðkennast av felagsins innanhýsis eftirliti – og av teimum eksternu góðskueftirlitum, sum verða framd av Grannskoðaraeftirlitinum.

Tí hevur NUMO Sp/f atgongd til:

- Dagførdar skipanir og amboð – herundir reglur fyri fakliga konsultatión og reglur fyri góðskustýringsgjøgnumgongd av børsskrásettum kundum, og kundum av serligum almennum áhuga
- Dagførdar standardir fyri tær veitingar, sum NUMO Sp/f veitir.

NUMO Sp/f fremur hvørt ár eitt innanhýsis eftirlit, sum skal finna møguligar feilir og manglar í okkara arbeiði, og har tað er neyðugt, verða tað ávístir møguligir vegir og betringar hesum viðvíkjandi.

Tað er málið hjá NUMO Sp/f, at tað ikki mugu vera kundauppgávur, har:

- Góðskueftirlitið metir, at nýtslan av innanhýsis mannagongdum er ófullfíggjað ella ikki nøktandi
- Góðskueftirlitið metir tað gjørda arbeiðið ikki at vera nøktandi.

Tað er yvirskipaða málið hjá NUMO Sp/f, at NUMO Sp/f ikki verður partur av ábyrgdarsakum, sum verða fráboðaðar til tryggingina.

Felagið hevur eina professionella ábyrgdartrygging við eini sjálvsábyrgd pr. skaða.

**Politikkur fyri óheftni**

Tað skal undir ongum umstøðum kunna setast spurningur við okkara óheftni mótvegis okkara kundum og teimum starvsfólkum, sum arbeiða fyri kundan.

Um ógegni kemur fyri ella vandi er fyri hesum, skal leiðsla felagsins beinanvegin kunnast um hetta, og so tekur leiðslan støðu til, hvussu málið verður loyst.

Hvørt ár skulu øll starvsfólk skriva undir eina váttan um óheftni eftir teimum etisku reglunum fyri grannskoðarar.

Ansað verður eftir, at ásetingarnar um at ábyrgdarhavandi partnarar skulu skiftast út 7. hvørt ár, tá talan er um fyritøkur við serligum almennum áhuga, verða hildnar.

Í sambandi við tilgongd av nýggjum kundum metir leiðsla felagsins um vandan fyri ógegni. Hetta verður gjørt skjótt við atgongd til neyðugar datugrunnar og innanhýsis amboð.

NUMO Sp/f góðtekur ikki nýggjar kundar ella uppgávur, um:

- Tað eru trupulleikar við at vera óheftir
- NUMO Sp/f ikki hevur neyðugan førleika og/ella kapacitet til at røkja uppgávuna
- NUMO Sp/f metir, at kundin ikki hevur neyðug evni til at reka virksemi í trá við krøv frá myndugleikum og lóggávu
- Kundin við síni atferð ella møguligir kenningar ikki liva upp til krøvini hjá NUMO Sp/f til etik og moral, sum ger tað møguligt hjá NUMO Sp/f at arbeiða fyri kundan
- NUMO Sp/f metir, at kundin ikki er førur fyri at gjalda fyri tær umbidnu tænasturnar.

Handilssamskifti millum felagið, partnarar og medarbeiðarar skulu vera við virðing fyri óheftni, og kundasambond skulu ikki nýtast til at fáa fyrimunir, sum kunnu viðføra, at óheftni verður í vanda.

**Innanhýsis vitan, børsetiskir reglar og reglur um nevndarpostar fyri starvsfólk**

Allir partnarar og medarbeiðarar hjá NUMO Sp/f eru undirløgd fylgjandi reglur um innanhýsis vitan, børsetiskar reglar og um nevndarpostar fyri starvsfólk.

*Innanhýsis vitan*
Medarbeiðarar og fyrrverandi medarbeiðarar í NUMO Sp/f mugu undir ongum umstøðum lata víðari vitan um viðurskifti í feløgum, hvørs virðisbrøv eru børsskrásett ella verða handlað á einum autoriseraðum marknaði ella tilsvarandi reguleraðum marknaði fyri virðisbrøv, sum hava ella kunnu fáa ávirkan á kursin. Hendan vitan kann vera t.d. upplýsingar um fíggjarligu støðu felagsins, sum ikki eru almennakunngjørdir, kapitalhækking, samanleggingar, keyp og sølu av dóttirfeløgum, perioduroknskapir v.m.

Upplýsingarnar kunnu hvørki gevast til persónar uttan fyri NUMO Sp/f ella aðrar medarbeiðarar hjá NUMO Sp/f.

*Børsetiskir reglar (innherja-handil)*
Partnarir umframt medarbeiðarar knýttir at eini ávísari uppgávu, teirra hjúnafelagi, sambúgvi umframt heimabúgvandi børn og feløg, har hesi hava avgerðandi ávirkan, kunnu ikki eiga virðisbrøv, sum eru noteraði á einum keypsskála í skrásettum feløgum, sum NUMO Sp/f er grannskoðari hjá ella í skrásettum feløgum, har NUMO Sp/f er valdur grannskoðari hjá móðirfelag ella dóttirfelag.

Um onkur av omanfyristandandi eigur partabrøv í einum felag, tá ið felagið gerst kundi hjá NUMO Sp/f, skal hesin selja hesi partabrøv í fyrstkomandi tíðarskeiði, har hetta kann gerast samsvarandi tilmælum frá NASDAQ/OMX Københavns Fondsbørs. Í praksis merkir hetta, at sølan bert kann vera í einum tíðarskeiði uppá seks vikur eftir almennakunngerð av ársfrásøgn, hálvársroknskapi, øðrum perioduroknskapum ella øðrum fráboðanum viðvíkjandi roknskaparligum ella øðrum slag, sum kunnu ávirka kursin.

NUMO Sp/f hevur ein lista yvir tey feløg, har NUMO Sp/f er grannskoðari, sum er atkomiligur fyri allar medarbeiðarar.

Tá ið nýggir partnarar og medarbeiðarar byrja hjá NUMO Sp/f, skulu tey skrivliga vátta teir børsetisku reglarnar – herundir at tey hava kunnað hjúnafelaga, sambúgva og heimabúgvandi børn um reglarnar.

*Nevndarpostar*
Grannskoðaralógin loyvir ikki, at partnarar í NUMO Sp/f lata seg velja sum grannskoðara hjá feløgum, grunnum, skúlum, eigara- og ella íbúðarfeløgum v.m. har partnarir og/ella medarbeiðarir eru valdir í nevndina.

Tað er tí eitt krav frá felagnum, at eingin kann átaka sær ein nevndarsess, uttan at hetta er skrivliga góðtikið av leiðsluni í NUMO Sp/f.

Nevndarpostar kunnu ikki forða fyri, at NUMO Sp/f kann gera váttanaruppgávur fyri núverandi og komandi kundar. Tí kann loyvi til hetta bert verða givið við teirri fortreyt, at loyvið verður afturkallað beinanvegin, um tað seinni verður vandi fyri, at ivi kann sáast um, hvørt óheftni er í vanda.

## Politikkur fyri eftirútbúgving

Felagsins politikkur fyri eftirútbúgving er tann, at allir góðkendir grannskoðarar skulu í minsta lagi lúka lógarinnar minstukrøv til eftirútbúgving. Hetta krav er 120 tímar yvir 3 ár. Harafturat skulu KT-grannskoðarar og grannskoðarar, ið grannskoða tryggingarfeløg og peningastovnar, hava 60 tímar eyka í eftirútbúgving á hesum serstøku økjunum. Hetta verður gjørt við at luttaka á skeiðum, serliga í Føroyum og Danmark, men annars har møguleiki er fyri at fáa viðkomandi skeið, sum lúka treytirnar fyri at fáa tímarnar skrásettar sum eftirútbúgving.

Fyri aðrar medarbeiðarar hevur felagið ikki ávísan politikk, men ansað verður eftir, at allir medarbeiðarar hava møguleika fyri leypandi eftirútbúgving. Ein partur av hesi eftirútbúgving fer fram innanhýsis í fyritøkuni.

**Seinasta góðskueftirlit**

Vit hava fingið eina skipan við góðskueftirlitum í Føroyum. Í fyrsta umfari verða eftirlitini útint av donskum eftirlitsfólki, sum eru góðkend at fremja eftirlit av donskum grannskoðanarvirkjum, sum eisini grannskoða PIE-kundar.

*Grannskoðanareftirlitið*
NUMO Sp/f hevur seinast havt alment góðkueftirlit á heysti 2022.

**Váttan frá leiðsluni um góðskustýringsskipanina og politikk um óhefni**

Leiðslan hevur ta fatan, at góðskustýringsskipanin hjá NUMO Sp/f virkar eftir ætlan, og at felagsins óheftnisreglur verða hildnar.

Mannagongdir og innaneftirlit minka um váðan fyri, at feilir uppstanda, men kunnu ikki útiloka henda váða. Góðskueftirlitið hevur ikki staðfest týðandi veikleikar hesum viðvíkjandi.

**Váttan frá leiðsluni um eftirútbúgving**

Leiðslan hevur ta fatan, at útbúgvingarpolitikkurin hjá NUMO Sp/f virkar eftir ætlan, og at hann verður hildin.

Tórshavn, hin 15. apríl 2024

NUMO, góðkent grannskoðanarvirki Sp/f

Súni Schwartz Jacobsen
statsaut. revisor

**Býti av heildarumsetninginum á samsýning fyri grannskoðan av ársfrásøgnum umframt ikki-grannskoðanaruppgávum**

Heildarumsetningur okkara fyri árið er býttur á samsýning fyri:

| | tDKK | % |
|---|---|---|
| Inntøkur frá granskoðan av kundum við almennum áhuga og atknýtt feløg | 360 | 3% |
| Inntøkur frá grannskoðan av øðrum kundum | 6.574 | 46% |
| Inntøkur fyri aðrar tænastur, har vit eisini grannskoða | 3.669 | 26% |
| Inntøkur fyri aðrar tænastur til  kundar, har vit ikki grannskoða | 3.703 | 26% |
| **Til samans** | **14.306** | **100%** |

**Yvirlit yvir virkir, fevnd av løgtingslóg nr. 50 frá 4. mai 2021 (Artikul 13 í fylgiskjali), sum grannskoðanarvirkið í roknskaparárinum frammanundan hevur gjørt uppgávur fyri:**

Suðuroyar Sparikassi P/F